# Kann “Skúladepilin við Marknagil” eisini fevna um – Tórshavnar Musikkskúla?

EGON ØREGAARD
Valevni fyri Fólkaflokkin



**Byggingin av Skúladeplinum**, henda framúr framskygda og góða verkætlanin, er fyrst og fremst ein uppgáva, sum áliggur landinum.

**Tórshavn, høvuðsstaður landsins**, kann gera munin, við at gerast ein virkin samstarvspartur.

**Hetta kann gerast** við m.a., at Kommunan og Skúladeplin, samstarva um eitt nú:

• Framførslu og Fyrilestrarhøll,- sum kann gerast karmur um venjing og framførslur, eisini hjá, Tórshavnar Musikkskúla, -eins og nógvir aðrir møguleikar eru fyri tónleiki og list.

• Býar-bóka/KT savni, Sum kann nýtast av næmingunum eins og vanliga borgaranum.

• Ítróttarumhvørvið í Skúladeplinum kann, aftaná skúlatíð, nýtast av øllum borgarunum í kommununi.

**Ótolandi vánaligu umstøðurnar hjá Tórshavnar Musikkskúla**

Fyri uml. einum ári síðani, var evni á óformellum fundi “*Samstarv millum Tórshavnar Musikkskúla og Skúladepilin við Marknagil*.

Frá báðum síðum var stórur áhugi fyri hesum hugskotinum.

Nevnast kann, at Føroya Studentaskúli og HF- skeið m.a.hevur tónleik sum lærugrein. Tí er framførsluhøll partur í Skúladeplinum.

Er tað tá ikki skilagott at gera samstarv millum Skúladepilin og Tórshavnar Musikkskúla??

**Við samstarvi millum kommunu og land kann Skúladepilin við Marknagil** gerast ein sonn “mentunarperla” í høvuðsstaðnum og ein fyrimynd fyri úheimin.

**Enn eru møguleikar** fyri samstarvi og sambygging.

Fyrireikingarnar í sambandi við bygging av Skúladeplinum eru komnar væl áleiðis, og hevur tað tí alstóran skund, skal tað eydnast at fáa sambygging - samstarv millum Skúladepilin við Marknagil og Tórshavnar Musikkskúla.

# Fjølmiðlamál

KRISTIN POULSEN



Millum ár og dag hoyrir tú fjølmiðlafólk nýta slíkar máliskur, at títt málhjarta grætur um, at hesi fólk, sum skuldu verið fyrimyndir okkara, eru so lítið at sær komin málsliga sæð. Útvarpið tekur t.d. fólk inn av gøtuni, sum ikki hava skil fyri tí grundleggjandi í mállæruni, at gera ítróttasendingar, og tað kann ein almennur stovnur ikki bjóða fólki.

Tað er sjálvandi í lagi, at fólk tala sítt bygdarmál í eini útvarpssamrøðu, sjálvt um hetta bygdarmálið hevur málsligar villur, men tað er ikki í lagi, at eitt útvarpsfólk í eini almennari tíðindasending nýtir sítt bygdarmál við málsligum villum. Tað er sjálvandi í lagi at siga (noy) og (nei), tí tað er ongin málsligur feilur, men tíðindaupplesarin eigur at nýta rættar bendingar og endingar. Tað er t.d. burturvið at lesa: Vit fingið!

Vit eita mong frálík frásøgufólk, sum siga frá ítrótti, t.d. Jógvan Arge og Hilmar Jan Hansen, men eg kundi hugsað mær at spurt Hilmar Jan, hvør stólpi er aftari, tí er annar aftari enn hin, so átti hann at verið fluttur! Hví ikki siga, sum hinir frásøgumenninir, handari stólpi og næsti stólpi?

# Matstovur til allar skúlar í Tórshavnar Kommunu

ANNFINN BREKKSTEIN
á lista B



Í dag hava allir almennir og kommunalir stovnar kantinur til starvsfólk, ein sjálvsfylgja í einum nútímans framkomnum samfelag.

Men hvat við skúlunum, hava allir skúlar kantinur til børnini at eta í – nei. Býráðsmeirilutin hevur valt at raðfesta ørðvísi, tey hava raðfest fyrisitingina í Tórshavnar Kommunu fram um skúlamál, (sí talvuna niðanfyri).

Okkara børn verða noydd at sita inni í skúlastovunum og eta sín matpakka. Skúlastovurnar eru slett ikki egnaðar sum kantinur. Okkara skúlabørn skulu hava kantinur, sum øll onnur starvsfólk hjá kommununi.

Skúlin er teirra arbeiðspláss, tí er kravið einfalt, allir skúlar skulu hava matstovur til børnini. Hetta er ikki meira enn rímuligt í einari framkomnari kommunu í 2008.

Niðanfyri síggja vit, hvussu **fyrisitingin í Tórshavnar kommunu** er svulmað upp við **10 mill. kr í** tíðarskeiðinum frá **2004 til 2008**. Hesin býráðsmeirilutin hevur niðurprioriterað skúlan og uppraðfest sína egnu fyrisiting. Vit skulu hava kantinur á allar skúlar í kommununi til frama fyri trivnaðin hjá næmingum og lærarum.

Hetta verður loyst tá vit aftur taka við leiðsluni í býráðnum.




## Andlát og jarðarferðir

**Julia Midjord úr Vági** fer til gravar úr Vágs kirkju hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Juliu, kunnu lata Eldrasambýlinum á Tvøroyri eina gávu. Konta í Føroya banka.

**Birthe Helene Egholm Leo** fer til gravar úr kirkjuni í Innri Njarvík í Íslandi fríggjadagin 24. oktober klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Birthe Helene, kunnu lata eina peningagávu á konto í Eik Banka.

**Dagny Petersen úr Sørvági** andaðist á Landssjúkrahúsinum leygarkvøldið, 73 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Anna Hermannsen**
(Anna hjá Rasmusi á Háskúlanum)

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til Sonju Klein, prest, fyri troystarrík orð.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Stóra tøkk fyri alla hjálp í sambandi við ervið.
Ein serlig tøkk til tykkum á Tjarnargarði, sum vóru um hana, tey árini hon búði har.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir, og tøkk til øll tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Ada og Hermann**

**Dagurin**
**23. oktober. Severius**, deyður umleið ár 400. Biskupur í Køln. Í Danmark er hann komin í bland við tann halga mannin Sørin úr Ry í Jútlandi